# Fyrst taka vit Manha – síðani Klaksvík

**- Eg havi fylgt nógv við í fótbólti, og eg ynskti tí at koma til Føroyar. Eg má bara staðfesta, at hetta er eitt sera vakurt land, serliga her í Klaksvík ein slíkan vakran summardag sum í dag, sigur ungi týski ferðamaðurin Zascha Grabow. Hann hevur sett sær sum mál at vitja øll heimsins lond og støð – 757 íalt. Í summar var hann og vitjaði í staði nummar 431**


- Tað er ótrúliga vakurt her í Klaksvík, sigur Zascha Grabow, sum hevur ferðast kring allan heimin. Hann er fyrsti týskarin ið hevur ferðast í meiri enn 400 londum og støðum

## Ferðamaður



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

**Klaksvík:** - Eg fari avstað við Norrönu mánadagin. Men kanst tú siga mær, hvussu eg komi til Rockall?

Fyrrverandi tennisleikarin og skíðinstruktørurin og myndamaðurin Zascha Grabow strálar av ferðahugi og lívsgóðsku, tá Sosialurin hitti hann í Klaksvík ein fagran summardag í august mánaði í ár.

Hann var júst komin higar á ferð úr USA og Íslandi, og skuldi nú víðari til Hetlands og Skotland í tráðan síni at gerast tann fyrsti – og helst eisini yngsti persónurin – sum hevur vitjað hesi ásettu 757 støðini hjá felagsskapinum Most Traveled People.

- Eg vil so fegin sleppa uppá Rockall, ið er eitt av støðunum á hesum langa listanum. Veitst tú, um eg kann fáa onkran at sigla meg út hagar?, spyr hann spentur á málinum. Tað eru bert 10 sum hava verið her áður, og nú ætlar Zascha at gerast tann 11.!!

Tað er týðiligt, at hesin týskarin ikki ætlar sær at helma í, fyrrenn málið er rokkið og hann hevur verið kring allan heimin. Hóast enn er langt á mál, tí enn vanta 315 støð, so hevur Zascha Grabow ikki beinleiðis skund at koma víðari.

Tá vit hittu hann í Klaksvík hevði hann fingið eitt minni arbeiði hjá eini fyritøku í býnum.

- Eg kundi gott hugsað mær at steðga eitt sindur longur her í Klaksvík. Um eg finni the-girl-in-my-life, fari eg ongan veg. Men so má tað vera skjótt, tí í dag er fríggjadagur og eg skal víðari longu mánadagin!, sigur hann við einum brosi.

## Mest ferðandi kring heimin

Íalt er 757 støð, sum tey ferðandi hava møguleika at vitja, sambært heimasíðuni www.mosttraveledpeople.com.

Hann, ið hevur ferðast til flest av hesum støðum, amerikumaðurin Charles A Veley, hevur vitjað í 709 støðum og vantar einans 48, og tann næstmesti, Bill Altaffer hevur vitjað 663 støð og vantar sostatt 94 støð. Nevnast kann, at báðir hava teir verið í Føroyum.

Á listanum liggur Zascha Grabow á einum 25. plássi við íalt 442 støðum, harav Føroyar telja sum eitt teirra. Meiri fæst at vita um ferðir hansara á heimasíðuni www.saschagrabow.com

### Út í ta stóru verð

Ungur, og við góðum ferðahugi, fann Zascha Grabow ein dagin í fjør eina heimasíðu á alnetinum, sum nærum broytti lív hansara ella sum lat upp ein nýggjan heim fyri honum.

Hann hevði longu sum 28 ára gamal sett kós út í ta stóru verð – úr heimbýnum Talheim og hagar leiðin og ferðahugurin annars bóru hann.

Henda heimasíðan – sum greitt verður frá aðrastaðni á síðuni – var serliga ætlað teimum, sum høvdu sama áhugamál sum hann:

At ferðast kring heimin og soleiðis uppliva, hvussu onnur fólk livdu og høvdu tað. Síðani kundi ein stovnseta egna heimasíðu, har onnur kundu fáa lut í hesum upplivingum teirra.

Tað var kortini eitt annað sum var uppaftur meiri spennandi við hesi heimasíðuni. Her var nevniliga ein listi yvir eitt ávíst tal av støðum, sum einhvør ferðandi við virðing fyri sær sjálvum átti at vitja kring allan heimin, og sum ein kundi verða skrásettur fyri.

### Áttu at sæð Klaksvík

Í hesum felagsskapinum var nú brádliga møguleiki at vitja nøkur ávís lond og støð, og síðani »kappast« við onnur um, hvør kann røkka fyrst teimum 757 støðunum, ið heimasíðan hevur valt út.

Ein partur av hesum er eisini at kunna koma við í Guiness-

*Eg kundi gott hugsað mær at steðga eitt sindur longur her í Klaksvík. Um eg finni the-girl-in-my-life, fari eg ongan veg. Men so má tað vera skjótt, tí í dag er fríggjadagur og eg skal víðari longu mánadagin*

Sosialurin